

*– At skera snórin av er ikki nakað stórt átak, men lítið er tað, sum ger stóran mun, helt Bjarni Djurholm fyri, tá hann skar snórin til Norðoyatunnilin av við einum grindaknívi*

liggja í breiðari samstørvum, til frama fyri landið alt, uttan at vit tó sum lokaløki missa okkum sjálvi burtur men framhaldandi verða ein sterkur samansjóðaður landspartur, sum framhaldandi fer at skapa virðir til frama fyri land og fólk okkara, segði Steinbjørn O. Jacobsen.

## 200.000 til RFF

Heldur ikki Bergur í Garði, formaður í P/F Norðoyatunlinum ivaðist í, at løtan var ein av teimum stóru hendingum í føroyskari samferðslusøgu.

– Tey yngru, hava ofta lyndi til at taka ta menning, ið er farin fram á samferðsluøkinum seinastu 30–40 árini, meir ella minni sum eina sjálvfylgju. Hava, um eg má siga tað soleiðis, fingið hana inn við móðurmjólkini. Vit lata okkum ikki imponerera, helt Bergur fyri og heler fram

– Fyri góðum 2 árum síðan varð fyrsta skotið Borðoyamegin latið av. Tað var millum aðrar Eliesar Sørensen, sáli, sum tann dagin var við at trýsta á knøttin. Hetta gjørdi hann, sum umboð fyri eitt ættarlið undan okkum, føddur beint eftir næstseinasta aldarskifti, har fjøll, firðir og sund avmarkaðu samskifti og samferðsluna millum oyggjar og millum bygdir.

– Eg haldi, at eg loyvi mær at minna okkum yngri á, at tað vóru hesi sum løgdu grundalagið undir tí vælferðarsamfelag vit hava í dag. Tær stóru útbyggingar, ið eru framdar á samferðsluøkinum er sjálvandi partur av hesum vælferðarsamfelagi. Tøkk havi tit fyri tað.

– Fyri okkum, ið hava havt ábyrgdina av hesi stóru verkætlan, hevur trygdin hjá teimum sum hava havt sítt dagliga arbeiði í tunlinum havt hægstu raðfesting. Nú Norðoyatunnilin verður latin upp fyri ferðslu, er tað okkara vón og okkara áheitan, at vit sum fara at nýta tunnilin, eisini koma at seta trygdina í hásæti.

– Partafelagið Norðoyatunnilin ynskir, nú tunnilin verður tikin í nýtslu, at heiðra tí arbeiði, ið gjørt verður, at bøta um ferðslutrygdina og ferðslumentanina - serliga hjá okkara ungdómi, segði Bergur og boðaði samstundis frá, at Nevndin fyri Norðoyartunnilin tí hevði avgjørt, at veita Ráðnum fyri Ferðslutrygd eina peningagávu stóra 200.000 kr. til hetta arbeiðið.



*Bergur í Garði ivaðist ikki í, at løtan var ein av teimum stóru hendingum í føroyskari samferðslusøgu.*



*David Reinert Hansen*